Eru tjørnuvíkingar gloymdir

Hans Jákup Simonsen
valevni javnaðarfloksins í norðurstreymoy

Í seinastuni hava løgtingsmenn lovað tunnlar til bygdir har vegasambandi er óhøgligt. Til dømis kan nevnast tunnil millum Øravík og Hov, millum Famjen og Øravík, millum Dal og Húsavík. Umframt kann nevnast millum Kambsdal og millum Fjarða, og tunnil undir Leirvíks bygd.

Hví nevnir eingin tunnil til Tjørnuvíkar ?

Tjørnuvík er ofta avbyrgd um veturin. Omanlop steingur vegin í fleiri dagar. Fólk sleppa ikki til og frá arbeiði, og sjúkrabilur sleppur ikki til bygdina. Tjørnuvíkingar hava ofta gjørt vart við, at teir ynskja ein tryggari veg. Tosað hevur verið um at gjørt tunnil ella at "skerma" vegin av fyri omanlopi. Nútíðar tøkni ger, at ein tunnil er tann besta og bíligasta loysnin.

Eg fari við tykkara stuðli á valinum at arbeiða fyri eini raðfesting av tunnilsgerð í Føroyum, har tunnil til Tjørnuvíkar skal raðfestast ovarlaga.

Trivnaðurin ikki olmussa, men rættindi

Niklái Petersen
valevni tjóðveldisfloksins í Norðurstreymi

Seinastu tíðina hava nógvar politiskar greinar verið at sæð í bløðunum, nógv verður gjara út, tað vil so verða, val er fyri framman.

Serliga eru tað tey gomlu, sjúku og veiku í samfelagnum, sum verða misnýtt í hesum ússaliga spælið.

Vit uppliva hettar til hvørt einasta løgtingsval, at tað verður lova teimum gomlu, sjúku og veiku í samfelagnum bæði líkt og ólíkt, hettar er lítið virðuligt, og eigur at halda uppat.

Tjóðveldisflokkurin vil seta nýggja dagskrá fyri trivnaðarmál í Føroyum.

Vit hava nú búskaparliga grundarlagið at gera varðandi loysnir fyri trivnaðin og vælferðina í Føroyum. Ein verulig loysn á trivnaðarmálum er fortreytin fyri framhaldandi vinnulívsmenning og búskaparvøkstri.

Eldrarøkt,pensiónir,dagstovnar,frítíðartilboð og bústaðarmøguleikar skulu ikki vera livibreyð hjá politiskum flokkum, sum verða drigin fram til hvørt val, og nýtt til stemmufiskarí og politiskan løtuvinning.

Eldrarøkt,dagstovnar, bústaðarmøguleikar skulu verða rættindir hjá øllum, ið ynskja tað.

Hetta er skylda hjá øllum politiskum flokkum í Føroyum. Latið okkum tí taka lógvatak saman og fáa hettar loyst á virðuligan og sámuligan hátt allari tjóðina at gagni.

Leigulóg og íbúðir

Jógvan Arge
Valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi

Stórur marknaður er fyri leiguíbúðum í Suðurstreymi. Hetta ger seg galdandi aftur nú, tí havnarfólk nøra seg alsamt, og flytingin til høvuðsstaðin er stór. Kommunan og einstaklingar standa seg als ikki at fáa til vega grundstykki til fólk at byggja á.

Tað eru heldur ikki øll, sum kunnu ella vilja byggja sær dýr hús. Onnur vilja fegin sleppa úr sínum stóru húsum, sum tey illa orka at halda longur. Tey eru tí mong, bæði ung og eldri, ið vilja hava eina íbúð, sum tey antin skula eiga alla, eiga lut í ella bert leiga.

Vit hava ein privatan leigumarknað, har fólk kunna leiga seg inn. Men hetta er ongin skipaður marknaður. Hetta er heldur ikki ein marknaður, har stórvegis krøv verða sett til íbúðirnar og umstøðurnar.

Stórt sæð er hetta ein marknaður, har hann, sum eigur íbúðina, leigar hana út fyri tað mánaðargjald, sum hann heldur seg kunna loyva sær - ella eitt sindur aftrat.

Hetta eru ikki góð kor hjá teimum, sum standa uttan bústað. Tey mugu í roynd og veru geva seg undir tær treytir, sum útleigarin hevur at bjóða, og tey hava onga trygd fyri, at bústaðurin lýkur minstutreytir, sum onkur felagsskapur ella myndugleiki átti at sett.

Vit hava onga lóggávu, sum skipar viðurskiftini millum eigara og leigara. Tað einasta, vit hava, er ein leigureglugerð fyri Tórshavnar Kommunu, ið fyriskrivar eina leigunevnd, sum er meir ella minni óvirkin. Hetta er ein 60 ára gomul skipan, sum tíðin er farin frá.

Tjóðveldisflokkurin hevur sett sær fyri at virka fyri at útvega møguleikar fyri at farast kann undir at byggja alternativar íbúðir til keyps, til leigu og til lutakeyps saman við kommununum.

Miðað verður eftir, at semja verður gjørd millum land og kommunur um at nøkta bústaðartørvin. Lógin um Húsalánsgrunnin skal broytast beinanvegin, so hann kann figgja íbúðarbygging í samstarvi við kommunurnar.

Íbúðarmøguleikar hjá fólki við serligum tørvi skulatryggjast sum ein rættur.

Samstundis, sum hetta verður loyst úr lagdi, virkar tjóðveldisflokkurin fyri, at rættindini hjá leigarum sum heild verða knæsett, so teir ikki verða so ótryggir, sum teir mangan kenna seg í dag.

Skipað viðurskifti á íbúðarmarknaðinum og skipað viðurskifti millum eigara og leigara elva til størri tryggleika hjá tí einstaka.

Loysingin ikki komin nærri aftaná fýra soltin ár hjá samgonguni

Atli Hansen
Valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Henda samgongan kom til verðina fyri fýra árum síðani við tí eina endamáli: at sannføra føroyingar um tað rætta í at taka ríkisfelasskapin av, loysa frá hinum partinum av ríkinum og stovna fullveldi. Fyri at kunna selja hugtakið til føroyingar varð tað pakkað inn í eitt annað hugtak: frælsi.

Síðani hevur landsstýrismaðurin í loysingarmálum, Høgni Hoydal, trúttað niður í føroyingar, hvørji framstig ið eru gjørd á hesi leiðini og hvussu nógv nærri vit eru komin loysingini hesu seinastu fýra árini og at tað í næsta valskeiði bert er ein formsak at taka endaligu loysingina og seta fullveldi á stovn.

Men Høgni Hoydal tosar meira og meira, sum um føroyingar ikki eru til. Hann skal nokk sjálvur klára hetta okkara vegna. Honum nýtist ongan at spyrja eftir.

Men veruleikin er ein heilt annar. Allir føroyingar kendu seg frælsar 30. apríl 1998. Eingin kendi seg á nakran hátt fjøtraðan. Og tað sama í dag. Hvør kennir seg ófrælsan? Ikki ein av okkum. Eingin broyting á hesum økinum. Men Høgni Hoydal hevur smart sett ligviðstekn millum frælsi og loysing. Tað kensluborna hugtakið frælsi rørir helst fleiri streingir í okkum enn tað kalda og spekulativa orðið loysing. Smart.

Men føroyingar lata seg ikki tøla. Allar kanningar váttar uttan at vilja tað, nevnliga hvussu tætt tað er millum sjónarmið og støðutakanir hjá Javnaðarflokkinum og hjá føroysku fakfelagsrørsluni.

Annars hava norðstreymoyingar høvi at hoyra, hvat Ingeborg Vinther sjálv hevur at siga - hon verður gestarøðari á politiskum hugnakvøldið, sum Javnaðarflokkurin skipar fyri í Vestmanna mikukvøldið.

benda á, at samgongan ikki hevur megnað at sannføra føroyingar um, at hetta var rætta kósin. Tvørturímóti.

Sambandsflokkurin vil verja hetta frælsi. Hann vil gera tað í ríkisfelagsskapinum og í kraft av ríkisfelagsskapinum. Okkara góða og ríka land gevur okkum allar hugsandi møguleikar at liva eina frælsa tilveru.

Men tað krevur eina skilagóða leiðslu, sum ikki spælir hasard við frælsinum. Tí mugu veljarnir á sama hátt sum til fólkatingsvalið stuðla sambandsflokkin. Tað er verja fyri varandi frælsi.

Tjóðveldið skírir fakfelagsleiðarar fyri leigusveinar Javnaðarfloksins

Hans Pauli Strøm
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Tað var skakandi at lesa grein hjá Heina Holm, tjóðveldisvalevni í Norðstreymoy, í Dimmalætting leygardagin. Hann leggur eftir Ingeborg Vinther, forkvinnu Føroya Arbeiðarafelags, Gunnleivi Dalsgarð, formanni Starvsmannafelagsins, Caritu Bjørklund, forkvinnu Føroya Pedagogfelags og Elsu Birgittu Petersen, forkvinnu Føroya Lærarafelags, og kallar tey fyri "leigusveinar Javnaðarfloksins". Orsøkin er at tey onki annað gera enn bara "herja á" móti sitandi samgongu "í tøttum sam starvi við leiðslu Javnaðarfloksins".

Heini skrivar eisini, at grundin til at "tað bara hevur gingið framá hjá øllum arbeiðarafeløgunum og Fiskimannafelagnum" er bara samgonguni fyri at takka, "og ikki fakfelagsformonnunum, ið alla tíðina hava roynt at lagt fót fyri og andøvt ímóti við óneydugum verkføllum og øðrum tiltøkum".

Hatta er skoðsmálið, fakfelagsleiðararnir fáa frá Tjóðveldinum. Hvat siga tey og limir teirra um tað?

Hinvegin er tað ein sannroynd, sum Heini Holm

Sjálvstýrislógin, tann savnandi faktorurin í ríkisrættarliga spurninginginum

Rasmus Niclasen
valevni Javnaðarfloksins í Vága valdømi

Einasti møguleiki at koma burturúr naggatódnini, sum valdar á ríkisrættarliga økinum, er at fylgja uppskoti javnaðarfloksins um sjálvstýrislóg Føroya fólks.

Sitandi samgongu hevur prógvað, at eftir 4 ára langa oyðimarkargongd er onki at vænta haðani. Meiningarnar eru líka nógvar, sum limir eru í samgonguni. Í einum síðsta vørri gjørdu teir tað lítið umhugsaðu gerð at skerja ríkisveitingina við 366 mió kr., væl at merkja til komandi samgongu at taka fylgjurnar av. Tað sýnist sum um teir spæla politikk, kanska gongur tað – kanska ikki.

Ístaðin fyri at søkja ósemjur, vilja vit vera semjusøkjandi. Útmeldingar frá limum úr fleiri flokkum benda á, at til ber at gera breiðar semjur um stórar partar úr sjálvstýrislógini.

Javnaðarflokkurin stuðlar ein eini gongd fram móti einum sjálvberandi føroyskum búskapi. Tað sama siga allir flokkar á tingi. Ósemjan liggur í, hvussu skjót tilgongdin skal vera.

Vit meta tað ikki vera ráðiligt uppá stutta tíð at taka 1 milliard út úr tí føroyska búskapinum uttan álvarsligar fylgjur. Hetta var jú eisini niðurstøðan hjá búskaparfrøðingum í Hvítu bók.

Ístaðin skjóta vit upp, at lutfall verður sett ímillum vøksturin í føroysku tjóðarframleiðsluni og minkingina í ríkisveitingini. Á henda hátt fáa vit tíð og umstøður til at styrkja um vinnulívið, soleiðis, at tað verður ein jøvn búskapargongd yvir móti einum sjálvberandi búskapi. Hetta merkir, at vit vinna okkum búskaparligt frælsi, áðrenn vit taka støðu til, um vit fara úr ríkisfelagsskapinum. Arbeiða vit í felag eftir hesum leisti, ber til at sleppa undan tí eljustríði, sum annars fer at seta dagskránna í komandi tíðum. Flokkarnir kunnu ístaðin brúka sína orku til veruligan politikk.

Landskassaskuldin

Vit hava framvegis eina ovurstóra skuld uppá 3,6 mia kr. til danska ríkiskassan. Eg eri samdur við búskaparfrøðingi, ið metir, at um tað var so týdningarmikið at taka hasar 366 mió úr føroyska búskapinum, so hevði verið hópin skilabetri at brúkt tær, heilt ella partvíst, til árligan eykavdrátt av landskassaskuldini. Á henda hátt høvdu vit verið skuldafrí eftir fáum árum. Týdningurin av at vera skuldafrír kemur serliga til sjóndar, um hugt verður at eldrabylgjuni. Framskrivingar siga, at meðan talið av pensionistum veksur við 30% komandi 15 árini, so økist talið av teimum í arbeiðsførum aldri einans 5 %. Hesi tøl tala fyri seg sjálvan.

Fólkið fyrst

Javnaðarflokkurin sigur: Fólkið fyrst. Tað hevur við sær, at gongdin fram móti einum sjálvberandi búskapi ikki má ganga út yvir vælferðarsamfelagið. Tað kostar at liva í einum vælferðarsamfelagi, og tað er ein útreiðsla, sum vit mugu átaka okkum. Í farna valskeiði hevur hetta mál ikki verið nóg væl umsitið og neyðugt verður við einari ávisari meirnýtslu. Serliga kunnu vit nevna eldraøkið og sjúkrahúsverkið.

Sjálvstýrislógin

Javnaðarflokkurin ásannar, at tíðin er farin frá heimastýrislógini, og at hon verður avtikin. Tað sama sýnast allir hinir flokkarnir at halda. Vit vilja at hon verður avloyst av eini sjálvstýrislóg, sum ruddar slóð fyri veruligum sjálvræði. Sjálvstýrislógin skal staðfesta ein samveldissáttmála millum Føroyar og Danmark, sum tvey sjálvstøðug og javnsett lond, í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.

Eftir hesum sáttmála eru ongar avmarkingar fyri, hvørji mál kunnu verða yvirtikin. Eftir hesum leisti kunnu vit ganga heilt fram at loysingini. Ikki fyrr enn tá, tá øll mál eru yvirtikin, og við einum sjálvberandi búskapi ber til við røttum at spyrja Føroya fólk, um tey framhaldandi ynskja at vera í ríkisfelagsskapinum ella ikki.

Hetta átti at verið ein gongd leið.

Eitt ógvuliga týdningarmikið val

Vilhelm Johannesen
valevni javnaðarfloksins í Norðoya valdømi

Løgtingsvalið 30. apríl er eitt ógvuliga týdningarmikið val. Spurningurin er, um borgarliga fullveldissamgongan skal halda fram, ella um andstøðan á tingi seinastu fýra árini skal taka við stjórnarvaldinum.

Um úrslitið av valinum verður tað, at andstøðan – javnaðarflokkurin og sambandsflokkurin – bert fáa 16 umboð, so er staðfest, at løgmaður ikki fær ein meiriluta ímóti sær í tinginum, og sostatt kann løgmaður halda fram. Sambært stýrisskipanarlógini kann løgmaður sjálvboðin leggja frá sær. Men fær hann ein meiriluta ímóti sær í ting-inum skal hann leggja frá sær.

Um úrslitið á valinum 30. apríl verður 16 til samgonguna og 16 til andstøðuna kann løgmaður sita víðari. Hann kann tá tilnevna landsstýrismenn úr tjóðveldisflokkinum, fólkaflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og miðflokkinum. Fullveldistilgongdin kann somuleiðis halda fram. Her hava vit løgtingssamtyktina um Sjálvstýri Føroya fólks frá 20. apríl 2001. Um andstøðan á tingi ikki vinnur reinan meiriluta á valinum verður henda samtyktin heldur ikki broytt ella sett úr gildi.

Sambært nevndu løgtingssamtykt skal stjórnarvald Føroya taka við í seinasta lagi 1. januar 2012. Sambært somu samtykt skulu dómstólar, ákæruvald, fongsulsmyndug-leikar, kriminalforsorg og almannamál koma undir føroyskt málsræði í seinasta lagi 1. januar 2006.

Alt hetta kunnu løgmaður og borgarliga fullveldissamgongan fáa frá hondini uttan at hava meiriluta í løgtinginum. Um avleiðingarnar av uppskotinum um Sjálvstýri Føroya fólks segði landsstýrið m. a. í viðmerkingunum: "At gera neyva meting av kostnaðinum,ið stendst av uppskotinum, er rættiliga trupult. Tilgongdin fer at hava avleiðingar fyri inntøkur og útreiðslur á fíggjarlógini við tað, at heildarveitingarnar úr Danmark verða lækkaðar so líðandi, til tær eru burtur, og at útreiðslur standast av nýggjum fyrisitingarøkjum."

Her verður sagt, at inntøkurnar hjá landskassanum verða lækkaðar, meðan útreiðslurnar til nýggj fyrisitingarøki verða hækkaðar. Tað vil siga, at eins og undanfarnu fýra árini, kunnu vit heldur ikki tey næstu fýra árini rokna við størri játtanum til almanna- og heilsuøkið, til útbúgvingarøkið, samferðslumálini o. s. fr. Tað merkir framhaldandi sparingar í eldrarøktini, í sjúkrahúsverkinum, í fólkaskúlanum og á øðrum útbúgvingarstovnum og í t. d. strandferðsluni. Við øðrum orðum vera lívskorini hjá fólkinum ikki ovast á skránni.

Ein atkvøða til miðflokkin, sjálvstýrisflokkin ella fólkaflokkin, er tað sama, sum ein atkvøða fyri fullveldisætlanini hjá Høgna Hoydal og tjóðveldisflokkinum. Við at atkvøða fyri einum av hesum flokkum, kann tín atkvøða tryggja, at løgmaður verður sitandi, uttan at hava meiriluta aftan fyri seg í tinginum, og at fullveldistilgongdin heldur fram eftir tí leisti, sum skorin er í løgtingssamtyktini um Sjálvstýri Føroya fólks. Vit fáa fleiri skerjingar í heildarveitingini og fleiri útreiðslur til nýggj fyrisitingarøki.

Hetta er sum sagt eitt ógvuliga týdningarmikið val. Helst tað týdningarmiklasta nakrantíð. Valið stendur ímillum, at verandi skeiva gongdin sleppur at halda fram, ella um vit vilja venda politiska rákinum. Eg vóni inniliga, at ein meiriluti av føroyingum vil venda tí skeiva politiska rákinum, sum verið hevur tey seinastu fýra árini.

Farið tí mannsterk á val og seti ein sterkan javnaðarflokk inn á ting. Javnaðarflokkurin setur FÓLKIÐ FYRST og setur lívskorini hjá fólkinum ovast á politisku dagskránna.

Gott val!

Eldrapolitikkur í verkið - íbúðir og sambýli undir Kráarbrekku

Eyðgunn Samuelsen

Hósdagin tann 4. apríl var samkoma í samband við at eldrasambýli og tær fyrstu 24 íbúðirnar til eldri undir Kráarbrekku í Klaksvík eru reistar og innilokaðar. Sambýlið kemur at hýsa 16 brúkarum. Hetta megnartiltak hevur Klaksvíkar Kommuna saman við visterheimsnevndini og íbúðargrunninum tikið stig til. Íbúðirnar kann ein flyta inn í tá ið ein er fyltur 60 ár.

Eitt grundsjómarmið viðvíkjandi eldrapolitikkinum má eftir mínum tykki verða, at tey eldru fáa ein virknan og hendingaríkan aldurdóm. Júst hetta, at ein sjálvur kann velja, meðan ein hevur heilsuna, um ein ynskir eina minni íbúð ístaðin fyri at vera í egnum bústaði sum longst, er av alstórum týdningi.

Hevur tú henda valmøguleika kann tú sjálv-/ur velja, hvat ið tú vil nýta tíðina til sum eldri. Nógv røsk eldri fólk hava alt ov nógv stríð av stórum tómum húsum, bæði tá tað kemur til tað dagliga við at halda húsini og til viðlíkahald. Fyri ikki at gloyma tað tungu figgjarbyrðu, ið eini stór hús eru hjá pensionistum, við tí alt ov lágu pensión vit hava í dag.

Eitt annað, ið hevur alstóran týdning, er at eldraíbúðirnar hava ein tílíkan kostnað, at øll, eisini tey ið bert hava fólkapensión at liva av, kunnu hava ráð at búgva í teimum. Íbúðarpolitikkurin skal ikki bert vera fyri tey fáu, munurin í inntøku í arbeiðslívinum skal ikki framhaldandi verða galdandi tá ið vit vera eldri. Vit skulu hava samhaldsfastar skipanir í eldraárunum.

Tí má virkast fyri at sjálvsognarstovnar, sum tann undir kráarbrekku, verða frítíknir fyri MVG og fáa sama íbúðarstuðul/rentustuðul sum fólk, ið seta búgv í egnum sethúsum fáa. Tað kann ikki verða rætt, at íbúðarpolitikkurin skal taka tey, ið byggja egin hús, framum og ikki vilja stuðla øðrvísi íbúðarbygging, soleiðis sum galdandi skipan er í dag. Í verki dýrka hesar báðar forðingar húsaleiguna við fleiri túsund krónum um mánaðin.

Hetta má broytast !!! Javnaðarflokkurin vil virka fyri íbúðarpolitikki fyri øll og samhaldsfastari eftirlon, so øll kunnu fáa ein virðiligan aldurdóm.